# Arbeiðarastættin er ikki farin við tí alstóra virðisvøkstrinum

Gjógvin millum vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni og arbeiðaralønini er vorðin munandi størri. Tað prógva tølini. Arbeiðarin hevur verið við sviðusoð.



Samanbering millum bruttotjóðarúrtøku pr. íbúgva (ovara strikan) og arbeiðaralønina, íroknað frítíðar- og eftirløn (niðara strikan)

Helvtarmunur er á vøkstrinum í eini arbeiðaraløn og vøkstrinum í BTÚ - bruttotjóðarúrtøkuni - sum er vanligi málistokkurin fyri vinnuliga inntøkuskapanina í samfelagnum, so arbeiðsmannalønin er ikki farin við tí alstóra virðisvøkstrinum í føroyska samfelagnum.

Tvørturímóti kann arbeiðarastættin skoða eina gjógv millum stættirnar, sum sigur, at BTÚ er vaksið við 107% síðani 1985, meðan arbeiðaralønin sama tíðarskeið bert er vaksin við 59 %. Hetta siga almennu tølini, sum tala fyri seg.

| | 1985 | 1990 | 1995 | 2000 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bruttotjóarúrtøkan 1000 kr. pr. íbúgva | 107 | 125 | 116 | 184 | 222 |
| Arbeiðaralønin Kr./t. | 63,99 | 82,7 | 84,39 | 92,2 | 101,86 |

Talvan við BTÚ og arbeiðaralønum vísir, at BTÚ veksur við ferð í mun til arbeiðaralønina. Vil ein gera alt heilt skilligt, so ber til at rokna í prosentum, og tá siga tølini, at BTÚ frá 1985 til 2002 er vaksið meira enn tí dupulta. Arbeiðsmannalønin er sama tíðarskeið bert vaksin við góðari helvt.

## Munurin bara økist

Arbeiðaralønin dragnar við árunum. Tað vísa tey greiðu tølini

Longu tíðliga í kjakinum um lønarvøkstur vildu arbeiðsgevararnir geva fólki ta fatan, at arbeiðsfólk hava fingið størri lønarhækkan enn onnur, men hetta er so langt frá veruleikin. Tað prógva tølini.







Arbeiðsgevararnir nýttu hetta í stóran mun sum høvuðsargument fyri at siga, at arbeiðarafeløgini ikki eiga at koma sær at biðja um meira í løn.
Eftirkannar ein tølini, so er myndin ein onnur. Arbeiðarin er við sviðusoð.
Tøl og talvurnar vísa hetta, men lat okkum greiða frá tølunum og talvunum.

Arbeiðsbólkarnir, sum nevndir eru, eru arbeiðsbólkar, sum Hagstova Føroya vanliga nýtir at gera samanberingar við. Arbeiðsmannaløn, handverkarar, starvsfólk (8.lønarstig) og tænastumenn (35. lønarstig). Hetta eru stig, ið ikki eru høgt á lønarstiganum. Og tølini eru við eftir- og frítíðarløn og eisini víst uttan eftir- og frítíðarløn. Á strikumyndunum er eftir- og frítíðarløn íroknað. Tølini vísa munin í krónum og oyrum og siga ikki so lítið.

Byrjað verður í 1985, tí starvsfólk í føstum starvi og við fastari løn fóru niður í løn í 90'unum, tá kreppa var. Farast má aftur um kreppuna, fyri at fáa rættvísa mynd. Fastlønt fóru niður í løn og eftirløn, meðan tímalønt á pappírinum høvdu óbroytta tímaløn, men í veruleikanum mistu arbeiði, og tað sæst ikki í turru tølunum.
Líkamikið hvussu tølini verða vend, so er munurin millum arbeiðaralønir og aðrar lønir vaksin - eisini, ella kanska serliga, seinnu árini.

| 1) íroknað frítíðar- og eftirløn: | 1985 | 1990 | 1995 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Arbeiðarar (sáttmáli ófaklærd) | 63,99 | 82,70 | 84,39 | 107,51 |
| Handverkarar (sáttmáli sveinaløn) | 70,18 | 91,60 | 94,58 | 124,53 |
| Starvsfólk (8. stig) | 80,05 | 104,15 | 97,77 | 126,69 |
| Tænastumenn (35. stig) | 109,07 | 141,53 | 131,10 | 169,51 |
| | | | | |
| 2) uttan frítíðar- og eftirløn | | | | |
| Arbeiðarar uttan frítíðar- og eftirløn | 58,44 | 73,19 | 75,86 | 92,20 |
| Handverkarar uttan frítíðar- og eftirløn | 64,09 | 81,79 | 85,79 | 108,20 |
| Starvsfólk uttan frítíðar- og eftirløn | 73,11 | 88,63 | 87,37 | 105,58 |
| Tænastumenn uttan frítíðar- og eftirløn | 87,61 | 111,85 | 104,96 | 133,85 |
| | | | | |
| **Munur í tímalonum, í kr.** | | | | |
| 1) | | | | |
| Arbeiðarar - Handverkarar, við frít.& eftirløn | 6,19 | 8,90 | 10,19 | 17,02 |
| Arbeiðarar - Starvsfólk, við frít.& eftirløn | 16,06 | 21,45 | 13,38 | 19,18 |
| Arbeiðarar - Tænastumenn, við frít.& eftirløn | 45,08 | 58,93 | 46,71 | 62,00 |
| 2) | | | | |
| Arbeiðarar - Handverkarar, uttan frít.& eftirløn | 5,65 | 8,60 | 9,93 | 16,00 |
| Arbeiðarar - Starvsfólk, uttan frít.& eftirløn | 14,67 | 15,44 | 11,51 | 13,38 |
| Arbeiðarar - Tænastumenn, uttan frít.& eftirløn | 29,17 | 38,66 | 29,10 | 41,65 |

Sosialurin 341800

Føroya Arbeiðarafelag Havnar Arbeiðsmannafelag Havnar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag



# HEILSANIR



**Góða elskaða Sigrið**
Hjartaliga tillukku á 4 ára degnum 3. juni. Eisini ein heilsan til Guðrun.
**Omman og abbon í Hvalba**





**Góði lítlibeiggi**
Ein seinkað føðingardagsheilsan á 30 ára degnum.
**Ynskja systrar tínar**



**Góði fitti Bjartur**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum. Takk fyri mangar hugnaligar løtur og takk at tú ert so raskur at hjálpa mær.
**Ynskir vinurin í Hagagerði**



**Góði fitti Finnbogi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku a tínum 3 ára degi 1. juni og Jesus pápi fylgi tær.
**Ynska Sólfríð, mamma og babba**



**Góði Fróði**
Vónandi er tú komin í buksur aftur, nú tú ert blivin 30 ára gamal.
**Heilsan lítlibeiggi**



**Góði elskaði Sakaris**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum, Jesus pápi verður við tær.
**Heilsan frá okum, lítla diddan**



**Hey góða Christel**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Nú er tú blivin stór. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Bestu heilsanir fastir v/ fam.**



**Halló tit báðar**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Her eru tit fittar Hertha og Christel. Alt tað besta. Vit eru spent til august Hertha.
**Ynskja vit í Haragerði 20**



**Hey góða Hertha**
Hjartaliga tillukku við 24 ára føðingardegnum, eisini ein heilsan til tín Bjartur 2. juni. Jesus signi framtíð tykkara.
**Ynskja mamma, babba og Edith**



**Góða Christel**
Hjartaliga tillukku við 13 ára degnum og takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Ynskir Jón Rói**



**Góða Hertha fastir**
Hjartaliga tillukku við degnum tann 31. mai og takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Heilsan Jón Rói**



**Góða elskaða Christel**
Hjartaliga tillukku á tínum 13 ára degi sum er í dag og Guds signing við framtíðini. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og pápi.**



**Góða fitta Christel**
Hjartaliga tillukku við degnum sum var 31. mai. Takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Heilsan LEC**



**Góði gubbin**
Tillukku við piparinum. Okur bíða spent nær brúdleypið verður.
**Heilsan okur á Tvøroyri og í Vági**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum 29. mai. Nú mást tú dríva á so vit kunnu flyta inn í húsini. Vit elska teg.
**Adrian og Eiler**



**Góði Fróði**
Vit eru so glað, at tú fann tær eina unnustu áðrenn tú fór um tey 30 árini. Hjartaliga tillukku við degnum 1. juni.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði Niclas**
Hjartaliga til lukku við 60 ára degnum
**Heilsan gita hvør**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ........................................................................
Bústaður: ........................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«